deildin

Argja Bóltfelag
Postrúm 2058
FO-165 Argir
www.ab.fo

STOVNAÐ
15. august 1973

FORMAÐUR
Andrass Drangastein

MEISTARI: Ongantíð (besta úrslit nr. 9 í fremstu deildini)

STEYPAVINNARI: Ongantíð

GREIPUVINNAR: Ongantíð

Í BESTU DEILDINI (2 ár) 2007, 2009-

Í EUROPA: Ongantíð



Einasta upphaldið hjá AB í fremstu deildini var í fyrraárið, tá liðið endaði næstaftast. Nú verður roynt av nýggjum, og málið er bíta seg fast í Vodafone-deildina

Mynd: Álvur Haraldsen

# Unglingar skulu vísa seg sum menn

**Á Argjum fáa fleiri ungir spælarar, ið eru uppvaksnir í felagnum, møguleikan at vísa, at teir nú eru førir fyri at verja AB í fremstu røð**

Fyrstu ferðina gekk tað ikki, tá ið argjamenn royndu seg í bestu deildini. Liðið flutti niður aftur eftir fyrsta árið í fremstu røð, men tó er tað ikki rætt at siga, at royndin miseydnaðist. Í fjør spældi AB seg aftur til pláss í bestu deildini. Nógvir ungir spælarar vóru á liðnum, og teir hava tikið seg væl fram.

Fyrsta partin av kappingini hilnaðist tað ikki væl, tá ið mest stóð á. Venjarin, Allan Mørkøre, helt tó fram at vísa ungu monnunum álit. Hann gav teimum møguleikan at vísa, hvør stíril var í teimum, og tá ið kappingin var liðug, hevði AB tryggjað sær uppflyting í bestu deildina.

Nú verður takið at halda tørn um plássið í fremstu røð. John Petersen og Allan Mørkøre hava ábyrgdina, og harvið kann ikki annað sigast, enn at teir báðir á beinkinum vita, hvat tað snýr seg um inni á vøllinum.

Miðalaldurin á liðnum er 21,5 ár. Í 20 manna hópinum eru átta ungir spælarar, sum eru uppvaksnir í AB. Aðrir føroyskir spælarar hava spælt meiri og minni í fremstu røð fyri onnur feløg, og so eru onkrir útlendingar.

Millum teir, sum eru uppvaksnir í AB, og sum tað verður roknað nógv við, eru 19 ára gamli álopsrættaði vongspælarin Dion Splidt og 17 ára gamli vinstrabeinti verjuspælarin Alex Mellemgaard.

Tann, sum hevur flestu royndirnar í fremstu deildini, man vera 27 ára gamli Janus M. Joensen, sum hevur verið við til at vinna fýra FM heiti við HB. 27 ára gamli Kenneth Jacobsen hevur verið við til at vinna FM við B36, og millum hinar, sum hava roynt seg í fremstu røð, eru verjuspælarin Høgni M. Joensen, og framrættaðu John Hansen, Rasmus Nielsen og Thomas Hans Rubeksen.

Aftur í ár verður miðvallarin Evrard Ble royndasti útlendski spælarin. Tað kann fara at vísa seg at hava stóran týdning, hvussu tveir aðrir útlendingar – walisiski verjuspælarin Liam Killa og miðvallarin Tehe Aristide av Fílabeinsstrondini – fara at standa seg.

Tað verður gingið upp í tað við lív og sál á Argjum. Arbeitt verður við at betra um umstøðurnar hjá áskoðarunum, sum taka dyggiliga á við AB, og so fæst at síggja, um tað í hesum umfarinum fer at eydnast at halda tørn um plássið í fremstu røð. Tað verður nú, at ungu menninir fáa møguleika at vísa, at teir í fótbóltshøpi eru menn!

**Hópurin hjá AB:**

**MÁLVERJAR**
Heðin Terji Stenberg
Danny Rasmussen

**VERJA**
Tehe Aristide
Janus M. Joensen (Áður spælt við HB)
Teitur Jóannesarsson
Rói Danielsen
Jónas Stenberg
Høgni M. Joensen (HB)
Alex Mellemgaard

**MIÐVØLLUR**
Evrard Ble
John Hansen (B36)
Dion Splidt
Rasmus Nielsen
Liam Killa
Jobin Schrøter Drangastein
Kenneth Jacobsen (B36)
Tummas Justinussen

**ÁLOP**
Nikolai Lindholm Eriksen
Thomas Hans L. Rubeksen (HB, B36)
Dánial Rói Olsen

**TILGONGD**
Tehe Aristide
John Hansen, B36
Liam Killa
Nikolai Lindholm Eriksen

**VENJARI**
John Petersen

**HJÁLPARVENJARI**
Allan Mørkøre

**MÁLMANSVENJARI**
Sámal Paulason